# Teitur í Føroyum við donskum sjónvarpsliði




**Fimm ferðandi eru í løtuni í Føroyum og ferðast við Teiti Lassen og einum sjónvarpsliði hjá DR2. Ferðaliðið koyrir í einum lítlum bláum bussi kring landið, og Teitur ger sjálvur av, hvagar leiðin gongur.**

TÓNLEIKUR
*Liv Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Danska sjónvarpsstøðin DR2 hevur í løtuni eina øðrvísi ferðasending á skránni, ið kallast DR2 Tours. Í hvørjari sending hava fimm ferðandi fin-gið møguleikan at fara á eina ferð í fimm dagar saman við einum kendum dana sum ferðaleiðara. Føroyski Teitur er ein av ferða-leiðarunum, og er bussurin í hesum døgum saman við Teiti og øðrum í Føroyum á vitjan.

Tá ferðafólkini keyptu ferðina, vistu tey ikki, hvagar leiðin gekk. Tí á ferðini avger ferðaleiðarin, Teitur, hvat tey skulu uppliva. Bussurin kom til Føroya týsdagin, í dag er ferðaliðið farið ein túr við Norðlýsinum, í kvøld setur Teitur kósina móti Sandoynni, síðan til Klaksvíkar og at enda til Havnar.

Teitur er tann síðsti av ferðaleiðarunum. Umframt Teit hava eitt nú Souvenirs, Jens Folmer Jepsen, Farshad Kholghi og Nikolaj Kirk higartil verið ferðaleiðarar.

Ferðirnar eru at síggja leygardag á DR2.

*Í hesum bussinum er Teitur á ferð í Føroyum við fimm dønum og einum sjónvarpsliði. Áðrenn ferðafólkini keyptu ferðina, vistu tey ikki, hvagar leiðin gekk. Ferðin kostaði 3.995 krónur fyri hvønn.*




Tænastan á Smyrli skal hækkast munandi, og á øllum økjum skal tann ferðandi setast í miðdepilin. Ein grundleggjandi hugburðar-broyting skal gjøgnumførast á okkara stásiliga flaggskipi, og tí verður søkt eftir tveimum tænastuleiðarum, ið hava evnini og viljan at fremja broytingarnar.

**Starvið**
Tænastuleiðararnir umborð á Smyrli skulu tryggja eina professionella kundatænastu á høgum stigi umborð. Tað at sigla skal verða ein uppliving í sær sjálvum, og myndaliga talað skal tað kennast sum at koma á hotell, har hugsað er um øll – børn, vaksin og gomul.

Starvsfólkini í vistaveitingini hoyra undir tænastuleiðaran. Tænastuleiðarin hevur ábyrgdina av rakstrinum av kafeteriu, kiosk, reingerð, fundarhølum og størri tiltøkum, og saman við fyrstakokki hevur tænastuleiðarin vøruinnkeyp og vørugoymslu um hendi.

**Umsøkjarin**
Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan tænastuvinnuna. Hevur tú arbeitt sum hovmeistari, yvirtænari ella leiðari á hotelli, eru vit sera áhugað.

Vit leggja stóran dent á leiðsluroyndir og viljan og evnini til at royna nýggjar leiðir. Ein umráðandi eginleiki er ein professionellur hugburður, har dentur verður lagdur á trivnaðin hjá tí einstaka ferðafólkinum. Tænastuleiðarin má verða dugnaligur at skapa nýggjar inntøkur og effektivan rakstur.

Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til mat, mugu vera vanir at brúka teldu og vera málsliga væl fyri. Góð samstarvsevni og evnini at kveikja sínar starvsfelagar eru ein fortreyt, skulu úrslit røkkast. Neyðugt er at hava heilsuprógv og trygdarskeið.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt sjálvstøðugt starv við spennandi fakligum avbjóðingum. Starvið sum tænastuleiðari er nýtt, og tí sleppur tú sjálv/ur at skipa og menna innihaldið í starvinum.

Smyril er nýggjasta skipið í flotanum. Hann hevur fingið viðurkenning fyri sítt snið, og arbeiðsumstøðurnar umborð eru frálíkar.

Arbeitt verður í skiftum, og tú kemur at arbeiða aðru hvørja viku og hava frí aðru hvørja viku. Setanartreytirnar verða annars skipaðar sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn og freist**
Vilt tú hava meira at vita um størvini, kanst tú venda tær til Heina á Borg, deildarleiðara, telefon 54 30 61 ella e-post: hab@ssl.fo.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. juli. Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Strandfaraskip Landsins
Starvsfólkadeildin
Boks 88
110 Tórshavn

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS